UTTAN ÚR HEIMI

Fólkatalið minkar eina helvt

Framrokningar hjá norsku hagstovuni benda á, at fólkatalið í Finnmørkini fer at minka eina helvt tey næstu 50 árini. Heldur metingin, verða bara 37.000 fólk eftir í landslutinum í 2053. Tey seinastu árini er talið minkað millum seks og sjey prosent um árið.

Framrokningin vísir, at politikkurin hjá mynd-ugleikunum í Oslo at eggja fólki til at verða verandi í Finnmørkini, er miseydnaður. Eftir galdandi skipan gjalda fólk har minni skatt enn aðrir norðmenn, tey fáa meiri barnastyrk enn onnur, og tey kunnu sleppa undan at rinda ein part av lestrarlánum aftur. Kortini minkar fólkatalið skjótt.

Lars Østnes á hagstovuni í Oslo sigur við norska útvarpið, at tað er fyrst og fremst vantandi arbeiðsmøguleikar, sum fáa fólk í Finnmørkini at flyta til aðrar partar av Noregi. Tey flyta serliga til teir stóru býirnar longur suðuri, og hagtølini vísa eisini, at tað eru serliga tær ungu kvinnurnar, sum flyta.

Søgan órógvar Schwarzenegger

Júst sum tann kendi filmsleikarin Arnold Schwarzenegger roynir at gerast guvernørur í amerikanska statinum Kalifornia, er komið fram, at pápi hansara var limur í tí illa kenda nazistiska SA, teimum sokallaðu "brúnskjúrtunum".

Arnold Schwarzenegger er sum kunnugt ættaður úr Eysturríki, og skjøl har hava avdúkað, at pápi hansara, Gustav Schwarzenegger, var ikki einans nazistur, men at hann eisini fór sjálvboðin upp í Sturmabteilung ella SA, sum var ein hernaðarlig deild hjá nazistaflokkinum.

Arnold Schwarzenegger hevur fleiri leingi vitað, at pápi hansara var nazistur, og í 1990 bað hann tann Simon Wiesenthal-stovnin kanna, hvat pápin hevði fingist við undir seinna heimsbardaga. Tá kom ikki fram, at hann hevði verið uppi í SA, men tað er komið fram nú, og Simon Wiesenthal-stovnurin fer nú at kanna málið nærri. Tað kann koma soninum illa við nú undan guvernørvalinum.

Ikki eiti á lønarhækking

Ein frágreiðing, sum svenska stjórnin kunngjørdi mánadagin, vísir, at stjórar og fólk í øðrum leiðandi størvum í svenska vinnulívinum hava fingið stóran lønarvøkstur tey seinastu árini.

Frágreiðingin vísir, at lønarmunurin ímillum tað vanliga arbeiðsfólkið og stjórarnar er vaksin nógv. Miðskeiðis í áttatiárunum var ein svensk stjóraløn í meðal millum fimm og tíggju ferðir so stór sum ein vanlig arbeiðaraløn. Í dag er hon 32 ferðir størri. Tað er eisini stórur munur á, hvussu nógv stjórarnir fáa. Ein stór fyritøka rindar ofta sínum stjóra einar tíggju milliónir svenskar krónur í løn og ymsum samsýningum, meðan stjórin í einari minni fyritøku fær millum eina og tvær milliónir krónur um árið.

Olle Rosander, sum hevur staðið fyri frágreiðingini, sigur við Svenska Dagbladet, at tað er serliga tey seinastu árini, at lønarmunurin hjá stjórunum og arbeiðsfólkinum er vorðin so stórur.

Kanna 36 ára gamla gátu

Tann 17. desember í 1967 fór táverandi avstralski forsætisráðharrin, Howard Holt, ein svimjitúr. Hann kom ikki aftur, og lík hansara varð heldur ongantíð funnið.

Síðani hevur dúgliga verið gitt, hvat var hent honum. Summi vildu vera við, at hann njósnaðist fyri Kina, og at ein kinesiskur kavbátur hevði tikið hann upp. Onnur hildu, at amerikanskir agentar høvdu beint fyri honum, tí hann hevði segðist hava ætlanir um at taka teir avstralsku hermenninar úr Vietnam. Uppaftur onnur hildu, at hann hevði tikið lívið av sær, og at enda hildu summi, at ein hávur hevði gjørt enda á honum.

Nú hava avstralsku myndugleikarnir gjørt av at kanna málið. Orsøkin til, at hetta ikki verður gjørt fyrr enn nú, er, at sambært lógini hava myndugleikarnir ikki kunnað kanna eitt tílíkt mál, uttan at líkið av tí deyða er funnið. Men nú er tann lógin broytt.

Í kvøld er Mars nær Jørðini

Tey, sum vilja hava eina "nærmynd" av reyðu gongustjørnuni, eiga at gera sær ómak í kvøld, tí hetta er avgjørt einasti møguleiki.

RÚMDIN
Árni Joensen

Tað er kanska í so nógv at siga, at gongustjørnan Mars er nær Jørðini, men í kvøld verður hon 55,7 milliónir kilometrar frá okkara gongustjørnu, og so nær hevur hon ikki verið Jørðini í næstan 60.000 ár.

Hóast teinurin er so langur, er lætt at fáa eygað á Mars í kvøld, men treytin er sjálvandi, at tað er klárt í veðrinum. Mars kemur upp í ein landssynning umleið klokkan átta í kvøld, og um eitt-tíðina í nátt verður hon umleið tjúgu stig oman fyri sjónarringin. Síðani ber til at fylgja henni alla náttina.

Tað er ymiskt, hvussu langt er millum Jørðina og Mars. Eitt nú hava vísindafólk roknað út, at í 2012 verður teinurin tvær ferðir so langur sum í kvøld. Og vit kunnu gott siga, at teinurin í kvøld er metstuttur, tí sambært vísindafólkunum hevur Mars ikki verið so nær Jørðini seinastu 59.619 árini. So tey, sum vilja fáa eina "nærmynd" av Mars, eiga at nýta hetta høvið í kvøld.

Endurvinningarverkið í Sellafield verður stongt

Endurvinningarverkið í Sellafield, sum er lagt undir at hava dálkað havið, verður latið aftur innan 2010, skrivar bretska blaðið The Guardian.

UMHVØRVI
Árni Joensen

Í fleiri ár hava írar, norðmenn og føroyingar biðið bretsku myndugleikarnar lata endurvinningarverkið á Sellafield-kjarnorkuverkinum aftur, og nú er líkt til, at áheitanin verður gingin á møti.

Bretska blaðið The Guardian skrivaði í gjár, at verkið gongur bert við hálvari megi orsakað av teimum altsamt veksandi umhvørviskrøvunum, og at tað tí stendur á hjá verkinum at arbeiða burturkastið undan. Harafturat er eftirspurningurin minkaður so nógv, at í dag liggja 75 tons av plutonium og 3.336 tons av urani í goymslunum, tí eingin hevur brúk fyri tí.

Stjórin á Sellafield-verkinum, Brian Watson, sigur við The Guardian, at verkið verður latið aftur innan 2010.

Serliga írar og norðmenn hava í mong ár kravt, at bretar skuldu lata endurvinningarverkið aftur. Fyri tveimum mánaðum síðani eydnaðist tað at fáa bretar at steðga útlátinum av evninum technetium-99 í níggju mánaðir. Írar hava kortini ikki verið nøgdir og hava lagt málið fyri altjóða dómstólin í Haag.

UTTAN ÚR HEIMI

Hann var tann versti bøðilin



Undir krígnum í Irak søgdu amerikanararnir, at hann var deyður, men "Kemiski Ali" var ikki deyður. Hann lá á einum sjúkrahúsi í Bagdad og flenti at tíðindunum. Men nú situr ein tann versti bøðilin hjá Saddam hussein í amerikanskari fangalegu.

IRAK
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Hansara rætta navn er Ali Hassan al-Majid, og hann var generalur í irsksku trygdardeildunum. Men tað ljóðar næstan ov vanligt. Eyknevni hansara, Kemiski Ali, er nærri veruleikanum.

- Hann umboðar tað ringasta av tí ringa í stýrinum hjá Saddam hussein, og tað sigur ikki so lítið, sigur leiðarin í mannarættindafelagsskapinum Human Rights Watch, Kenneth Roth.

- Hugsa tær at síggja hann sita í vitnisstólinum í Haag. Tað hevði verið óført, hvur miðeysturserfrøðingurin hjá sama felagsskapi, Mohammed Dayem, einaferð sagt.

Hósnáttina í síðstu viku tóku amerikanararnir hann. Tað var deildin Taske Force 20, sum fann hann, men amerikanararnir vilja ikki siga, hvar tann deildin var, tá hon kom fram á Ali Hassan al-Majid. Tað er heldur ikki so løgið, tí Taske Force 20 er ein av deildunum, sum leita eftir Saddam Hussein sjálvum.

Eftir at teir báðir synir Saddams doyðu herfyri, søgdu amerikanararnir, at frákoyrdi forsetin helst fjaldi seg í sunni-muslimska økinum norðan fyri Bagdad, og at hann fjaldi seg saman við júst "Kemiska Ali". Var hendan metingin røtt, er tað hugsandi, at amerikanararnir hava verið nær Saddam sjálvum hósnáttina. Men hann varð so ikki tikin.

Tað er eisini rættiliga hugsandi, at teir báðir flýddu í felag, og at teir hava fjalt seg í sama staði, tí gamli einaræðisharrin hevði fult álit á Ali. Tað var Ali, sum fekk tær mest óhugnaligu uppgávurnar, tí Saddam visti, at generalurin helt seg ikki aftur, sama hvør uppgávan var. Hann var tann føddi bøðilin, sigur Kenneth Roth.

Halabja

"Kemiski Ali" hevði eisini sínum gamla einaræðisharra nógv at takka fyri. Áðrenn Saddam kom til valdið, var hann bert ein vanligur hermaður, men aftaná kom hann skjótt upp eftir hernaðarliga stiganum. Í 1978 varð hann settur til guvernør í tí kurdiska økinum í Norðurirak, og her skipaði hann fyri tí sokallaða Anfal-hópmorðinum ímóti kurdunum. Heitið stavar frá einum broti í Koranini, sum loyvir ráni í krígstíð, og í tíðarskeiðinum frá mars í 1987 til apríl í 1989 hvurvu umleið 100.000 kurdar, vilja mannarættindafelagsskapir vera við. Tað var undir hesum átakinum, at guvernørurin fekk heitið "Kemiski Ali", tí hann nýtti kemisk vápn ímóti kurdunum.

Tað mest umrødda álopið av hesum slagnum var, tá menninir hjá Ali lupu á býin Halabja í mars í 1988. Har vórðu 5.000 ósek fólk myrd við eiturgassi, sum tyrlur sprændu oman yvir býin. Mong munnu hava sæð ta søguligu myndina av tí deyða abbanum, sum situr og heldur um tað deyða abbabarnið.

Eitt kurdiskt vitni, Araz Mohamed Amin, greiddi seinni frá, at hann misti trettan av sínum í hópdráp-inum í Halabja. Í einari samrøðu við Los Angeles Times greiddi hann frá, at hann hevði mist ein mammubeiggja, eina fastur og eitt systkinabarn. Ein annar mammubeiggi hansara misti sjónina, og eitt systkinabarn hansara fekk lunguni oyðiløgd.

Hann ræðast vit øll

Men "Kemiski Ali" var ikki liðugur enn.

Tá Saddam Hussein gjørdi av at gera innrás í grannalandið Kuwait, varð Ali tilnevndur guvernørur har, men tríggjar mánaðir seinni varð hann fluttur haðani, tí sjálvt Saddam helt hann vera ov harðrendan. Men tað helt einaræðisharrin ikki, tá shiamuslimski uppreisturin í Suðurirak skuldi berjast niður aftan á Flógvakríggið. Her var Ali aftur tann rætti maðurin, og undir einum herrópi um, at nú skuldi endi gerast á shiamuslimunum, fór hann til verka.

Úrslitið sæst enn tann dag í dag. Í 1991 búðu umleið 250.000 shiamuslimar í økinum millum áirnar Eufrat og Tigris. Í dag er talið niðan fyri 40.000.

"Kemiski Ali" lat seg ikki steðga av kjøti og blóði. Hann er systkinabarn Saddam, og í 1995 fingu teir ein trupulleika. Tveir versynir Saddams vóru flýddir til Jordan, har teir greiddu frá øllum loyndarmálunum hjá stýrinum í Bagdad, og millum annað avdúkaðu teir fyri fyrstu ferð, at Irak hevði hópoyðingarvápn. Annan versonurin, Saddam Kamel, greiddi eisini frá, hvussu Saddam og hansara mest trúføstu stuðlar í stjórnini kappaðust um, hvør kundi vera tann mest harðrendi. Men eingin, ikki ein kundi sammetast við "Kemiska Ali". Hann ræðast vit øll, segði Saddam Kamel.

Í 1996 lótu teir báðir versynirnir seg lumpa aftur til Irak, og neyvan av tilvild var tað "Kemiski Ali", sum tók ímóti teimum - við at myrða báðar.

Amerikanska herleiðslan vil ikki siga, hvar bøðilin er, og hon vil heldur ikki siga, hvat ætlanin er at gera við hann.

Men tikin er hann.

(Kelda: Berlingske Tidende)